Norðurlandahúsið er opið mánadag - fríggjadag kl. 10.00-17.00
leygardagar kl. 11.00-17.00
sunnudagar 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
tel 31 79 00 · fax 31 97 90 · www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

## EIVØR Í KLASSISKUM BÚNA

**Eivør syngur saman við íslendska Kasahópinum og roynir enn einaferð nýggjar leiðir. Á pallinum eru seks kvinnur, ið lata løgini hjá Eivør í ein klassiskan búna**



Frá vinstru: Nína Margrét Grímsdóttir, klaver, Sif M. Tulinius, violin, Áshildur Haraldsdóttir, floyta, Helga Þórarinsdóttir, violin, Bryndís Björgvinsdóttir, cello



Eivør Pálsdóttir hevur gjørt nógv um seg síðsta árið og hevur verið at sæð og hoyrt í fjølbroyttum høpi. Nú vísir hon enn eina síðu av sær sjálvari. Leygardagin 19. februar klokkan 17 fáa vit aftur høvi at uppliva Eivør á palli í Norðurlandahúsinum. Hesa ferð verður tað í einum klassiskum samanhangi saman við klaveri, violin, cello og floytu.

Kasahópurin, ið er eitt íslendskt kamarorkestur, setti seg tíðliga í fjør í samband við Eivør. Tey ynsktu at gera eina konsert saman við henni og hennara tónleiki. Eivør hevur síðan arbeitt við at fáa tónleikin útsettan til kamarorkestur, og tað hava Hilmar Ørn Hilmarsson, Árni Mathiasson, Pétur Grétarsson og Kjartan Valdemarsson síðan fingið í lag.

Løgini, ið spæld verða, eru fyrst og fremst løg hjá Eivør, men harumframt framføra tey eitt íslenskt skjaldur "Krummi sat á Klettagjá" og so vøgguvísuna "Sof ðu unga ástin mín". Kendi føroyski sangurin "Far lítli útum ein løtu og spæl", ið Finnbogi Ísakson skrivaði, verður her framførdur við lagi, ið Esmann Jacobsen úr Gøtu skrivaði fyri nøkrum árum síðan.

Kasahópurin var settur á stovn í 2001 og hevur síðani tá regluliga havt konsertir bæði í Íslandi og aðrastaðni, eitt nú í Japan, og ummælini hava verið sera góð.

Við í Kasahópinum hesa ferð verða 5 kvinnur, og tað er helst eitt sindur forkunnugt at síggja orkesturframførslur bara við kvinnum. Kvinnurnar í Kasahópinum eru: Nína Margrét Grímsdóttir, klaver, Sif M. Tulinius, violin, Áshildur Haraldsdóttir, floyta, Helga Þórarinsdóttir, violin, og Bryndís Björgvinsdóttir, cello. Og so tann sætti sansurin sjálvandi: Eivør!

---

## GREIVIN AV ST. KILDA SÝNIR FRAM

**Norðurlandahúsið sýnir í hesum døgum fram 72 sermerktar myndir eftir navnframa Karl Einarsson Dunganon. Edvard Fuglø leggur til rættis**



"Noget af den allerstørste kunst fra tidernes morgen er skapt uden teori, men med tro, mod eller med kult".

Soleiðis tók Karl Einarsson Dunganon, sáli, einaferð til í einari samrøðu. Nú verður hansara list fyri fyrstu ferð sýnd fram í býnum hann vaks upp í - við trúgv, dirvi og eitt sindur av kult.

Framsýningin hevur fingið navnið "Greivadømi", tí sjálvur útnevndi hann seg Greiva av St. Kilda. Framsýningin er fingin í lagi við samstarvi millum Norðurlandahusið og Listasafn Íslands, sum Karl Einarsson læt allar sínar málningar við arvabrævi. Tað er Edvard Fuglø, sum valdi myndirnar út og setti framsýningina upp.

Talan er um eina serliga framsýning eftir ein heilt serligan mann. Her verða framsýndar 72 myndir frá "L'oracle humain" eftir Dunganon. Tað er eitt verk, ið er samansett av umleið 300 myndum, allar í støddini 19x12,5 cm, nakrar gjørdar í oljukriti og nakrar eisini við akvarell og tusch í árunum frá 1948 til 1960.

Karl Einarsson Dunganon æt upprunaliga Karl Kerúlf Einarsson og varð føddur í Seyðisfirði í 1897. Longu í 1900 flutti hann saman við mammuni og pápanum og tveimum systkjum til Føroya. Hann vaks upp í Tórshavn, í Dungahúsunum hjá foreldrunum í Bringsnagøtu. Pápi hansara, Magnus Einarsson, var urmakari og keypmaður í Havn, men flutti stutt eftir fyrra veraldarbardaga til Keypmannahavnar. Har fór Karl í handilsskúla, men skjótt fór hann at ferðast ymsastaðni í Evropa - fyrst til Spania og haðani til Fraklands og Belgia, har han var í longri tíð. Har hitti hann eisini Siggert Patursson, og teir báðir høvdu eitt ævintýrkent vinarlag. Seinni, í 1927, búsettist Dunganon í Keypmannahavn, og har búði hann fyri tað mesta, til hann andaðist í 1972.

Hann fór tíðliga at skriva, bæði á bundnum og óbundnum máli, men seinni fór hann at mála og tekna. Sítt lívsverk læt hann íslendska statinum, ið skuldi stovna "Dunganon Foundation" til at fyriskipa framsýningar, útgeva verk og umsita upphavsrættin. Hann gav út fleiri yrkingasøvn, og í 1962 útkom t.d. yrkingasavnið "Corda Atlantica" á 17 ymiskum málum, teirra millum vóru íslendskt og føroyskt.

Myndir hansara vórðu fyrstu ferð sýndar fram á Listahátíð Reykjavíkar í 1976. Nú eru tær komnar til Føroya, her hann vaks upp, og nógvar ódeyðiligar søgur eru eftir hann.

Framsýningin "Greivadømi" er í Húsinum til 6. mars.

---

## KLIPP: UM EG VENDI MÆR VIÐ

**Klipp, filmsfelag Norðurlandahúsins, sýnir tann 9. februar svenska filmin "Om jag vänder meg om", ið hevur fingið fleiri heiðurslønir**

"Om jag vänder meg om" vann fýra Guldbage-virðislønir í 2004. Filmsfestivalin í Berlin sama ár gav leikstjóranum Björn Runge "Der Blaue Engel"-virðislønina fyri besta evropeiska filmin, og filmsliðið fekk eina silvurbjørn fyri samanlagt besta sjónleikin.

Tað var væl uppiborið, hildu ummælararnir, tí filmurin er eitt norðurlendskt meistaraverk um lygnir, sjálvssvik og aðra menniskjaliga vesaligheit.

Sjálvur sigur Björn Runge, at hann vil lýsa nøkur miðaldrandi fólk á teirra ringasta degi í lívinum. Filmurin er um tríggjar ymiskar lagnur, ið verða fortaldar eina langa nátt. Tá ið nýggi dagurin byrjar, savnast træðrirnir í eina søgu, ið samantvinnar hjúnalagskreppur og samfelagsspeisemi.

Meðan dimmið so líðandi lættir, koma nýggj sjónarhorn fram fyri fólkini, ið verða møtt við fyrigeving og einum nýggjum møguleika. "Om jag vänder meg om" er um fólk í broyting. Um týdningin at venda við fyri ikki at falla í avmakt. Boðskapurin er, at kærleikin er størri enn hatur.

Filmurin ýður í kenslubornum løtum við nógvum nærmyndum, ið setir fokus á frálíka sjónleikin. Björn Runge sigur sjálvur, at hann fór eftir andlitunum, tí har síggjast kenslurnar. Rúmið hevur bara týdning í fyrstuni, og leikstjórin stendur fast við, at innihaldið í filminum kemur fram um formin.

Allur filmurin er tikin upp eftir 13 døgum, og hvør leiktilburður er tikin upp í einum uttan slit. Myndamaðurin ferðaðist millum sjónleikararnar, og gjørdist sostatt sjálvur ein leikari. "Om jag vänder meg om" er í ætt við Bergman, men uppaftur týðiligari er, at danski dogmefilmurin hevur givið ríkan íblástur.

"Om jag vänder meg om" er 115 minuttir til longdar og verður sýndur í Norðurlandahúsinum tann 9. februar klokkan 20. Atgongumerki fáast í húsinum.

---

## HELGA HJÖRVAR TAKKAR FYRI SEG

**MÓTTØKA:** Nýggjur stjóri fyri Norðurlandahúsið byrjar í februar. Samstundis takkar Helga Hjörvar fyri sína tíð á odda fyri Norðurlandahúsinum í Føroyum. Í hesum sambandi verður samkoma fyri Helgu Hjörvar í Norðurlandahúsinum mánadagin tann 31. januar klokkan 15.

---

## KAMARTÓNLEIKUR ÚR SVØRÍKI

Kamartónleikabólkurin "Quattro Musicanti" úr Svøríki leika í Norðurlandahúsinum hósdagin 24. februar. Tey spæla barokktónleik, norðurlendskar kompositiónir og norðurlendskan fólkatónleik.

Teir fýra leikararnir í bólkinum eru Ragnhild Hadland sopran, Linda Saglien Svensen trompet, P. K. Svensen trombone og Terje Hadland piano og orgul. Bólkurin hevur spælt víða, og í løtuni eru tey á konsertferð í Norðurlondum.